


**Nr. 19** **15. september 2013** **73. árg.**

# At liva í Harranum

*Líkasum tit tí hava tikið ímóti Kristi Jesusi, Harranum, soleiðis skulu tit liva í honum.*
*Kol. 2,6.*

**Kristi Jesusi, Harranum**; set eina striku undir hesi trý orðini. Ikki hvør tann, sum sigur Harri! Harri! Kemur inn í Himmiríkið, men tann, sum hevur skilt, at lýdni er tekinið fyri ektaða trúgv.

At taka ímóti Kristi sum Harra er at sleppa hugsanini um sjálvur at vera harri. Tað er ikki at hava við at gera at skula klára tilveruna sjálvur. Hóast okkara natúr stríðir ímóti, mugu vit gevast. Trýstið uttanífrá er ov ógvisligt, og ákærurnar innanífrá eru ov sterkar, og ikki ber til at avgreiða skuldini við avbetaling; tað gongur aldri gott.

Tí taka vit ímóti Jesusi Kristi. Trúgv er at taka ímóti. Um vit ikki taka ímóti eins og eitt lítið barn tekur ímóti, koma vit ikki inn í Ríkið; tað hevur Jesus sagt. Hann hevur lovað at taka ábyrgdina. Hann hevur strikað okkara skuldarbræv, og stór er hansara trúfesti. Hann spyr bara, um vit vilja taka ímóti honum; og tað **vilja** vit.

Vit taka ímóti Jesusi Kristi **sum Harra**, og eru harvið inni undir eini nýggjari ábyrgd. Trúgv er lýdni, og tað hoyrir ongastaðni heima at pástanda, at vit hava álit á Kristi, um vit ikki vilja innrætta okkum eftir tí, sum hann sigur. Her er ikki talan um pliktarbeiði undir trælakorum, men í takksemi at yvirgeva seg til hansara, sum altíð bara vil okkum tað besta.

Sum Harra taka vit ímóti Kristi og mugu tí liva lív okkara í honum í sólskini og í ódnarveðri. Tá ið ynskini verða uppfylt, og tá ið tað óskiljandi hendir. Tá ið vit í felagsskapi styrkja hvørannan, og tá ið vit í einsemi stríða okkum fram. Í honum liva vit lív okkara, og frá honum

fáa vit frímóð. Hann er **Harrin**, Og tí veldst tað ikki um okkara ágrýtni, men um hansara miskunn. Hann hevur givið okkum orð sítt við tilsøgn um, at málið verður nátt, um vit dag frá degi taka ímóti honum sum Harra og liva lív okkara í honum.

*Jesus mín trúfasti Harri og kongur,*
*øllum, tú vanst mær, eg taki ímót!*
*Ei vil eg tærast av ivanum longur;*
*tú hevur lovað at leiða mín fót.*

# Faðirsins hjarta

**Faðirmyndin**
Fólk flest hava eina faðirmynd, sum er merkt av, hvussu jarðiski faðir teirra var móti teimum upp á gott og ónt. Mong hava djúp sár í sálini, av tí at teir, sum áttu at verið fastleikin og tryggleikin í lívinum, sviku kall sítt. Hjá teimum kann orðið faðir vekja vond minni og ringar kenslur, sum eru lættar at flyta yvir á Gud sum faðir. Tey hava fyri neyðini at verða grødd innan, at fáa eina lekta faðirmynd, so tey fáa upplivað tryggleikan í Gudi og at kunna hvíla í honum. Hann, sum so listarliga hevur skapað okkum djúpt í móðurlívi, Sálmur 139. “Hann, sum allur faðirskapur fær navn av á himnum og á jørð.” Ef. 3,15.

**At læra Gud at kenna**
Í Jóhannesar ev. 17,3 sigur Jesus: “Men hetta er hitt æviga lívið, at kenna teg, hin eina, sanna Gud, og tann, sum tú sendi, Jesus Kristus.” Um vit skulu læra at kenna hann, mugu vit hava felagsskap við hann og søkja nærveru hansara í Orðinum og bønini. Í Sálmi 25,14 stendur: “Harrin hevur samlag (samfelag) við teir, ið hann óttast.” Gud hevur altso bæði stundir og vilja at geva børnum sínum slíkt uppmerksemi, at hann leggur alt annað til viks og savnar seg um tað, sum tú hevur at siga. Ja, enntá hárini á høvdi tínum hevur hann talt. Men hava vit hinvegin vilja og tíð nokk til hansara? Í Matt. 6,33 stendur: “Men søkið fyrst Guds ríki og rættvísi hansara, so skal alt hetta verða tykkum givið umframt.” Tað er ikki torført at náa Gud; men tað kann taka tíð at fáa egna sinn okkara at sissast so passaliga, at vit kunnu hoyra rødd hansara. Hvat var tað Sálomon bað um? Jú: “Gev tænara tínum hoyriligt hjarta.” (1. Kong. 3,9) Og Paulus bað fyri fólkinum í Efesus, at Gud mátti upplýsa hjartans eygu teirra. (Ef. 1,18) Gud vil geva hjørtum okkara oyru at hoyra rødd sína og eygu at síggja veg sín.

**Hvat er Guds vilji?**
Í Rómverjabrævinum 12,2 stendur: "... men verðið umskapaðir við endurnýggjan av hugi tykkara, so at tit mega fáa at royna, hvat ið er Guds vilji, hitt góða og hugnaliga og fullkomna." Í Matteus 6 stendur Faðirvár. Í versi 10 lesa vit: "Komi ríki títt; verði vilji tín sum í himli so á jørð." Mong hava trupulleikar at biðja av hjarta: "Verði vilji tín." - Hjá mær er tað beint øvugt. Tað er eingin bøn, eg biði oftari og meira inniliga enn júst hesa. Hetta er rópið í sál míni og fatar um allan mín hjartans longsul: "Faðir, verði vilji tín!" Serliga eftir at eg skilti framhaldið: "sum í himli so á jørð." Altso, tað sum hendir í himli er Guds vilji. Har hendir hansara vilji 100%, tí har er hin óndi og tað ónda útistongt og hevur onga ávirkan. Jesus lærir okkum at biðja, at tað eisini má verða soleiðis á jørðini. Kanst tú hugsa tær eina betri bøn? Gud hevur ikki ein vilja í himlinum og ein annan á jørðini. Hann skapaði okkum í paradísinum, fyri at vit skuldu vera har, og hann frelsti okkum aftur til paradísið við sáttargerðini á Golgata. Faðirhjartað broyttist ikki, sjálvt um menniskjan fall og valdi sær ein annan harra.

**Rópið í Faðirsins hjarta**
Hann fór út í urtagarðin og rópti á Ádam: "Ádam, hvar ert tú?" Og hetta er rópið í Faðirsins hjarta til allar tíðir: "Menniskja, hvar ert tú?" Tú, sum ert pápi, tú, sum ert mamma skilir eitt sindur av hesum kærleika, hesum longsli, sum liggur í hesum rópinum. Og hvørt menniskja á hesi jørð kann seta egna navn sítt staðin fyri Ádam, tí "hann vil, at øll menniskju skulu verða frelst og koma at kenna sannleikan," stendur í 1. Tim. 2,4.

*Effie Campbell* umsetti.

# Bøn

Faðir í himlunum! Tøkk, at tú ikki hevur slept mær. Eg hevði tað uppiborið, men tú ert góður og hevur miskunnað mær. Tøkk, at tú ávirkar meg ígjøgnum alt hitt tunga, eg má tola.

Eg biði teg: fullfør góða gerning tín við mær. Boyggj vilja mín, bræð hjarta mítt. Frels meg frá øllum treiskni og beiskleika móti tær. Fyrigev mær allar syndir mínar. Oys náði tína yvir meg. Styrk meg, at eg altíð havi nóg mikið í tær.

Harri Jesus! Lat meg ikki líða til fánýtis. Lat tað verða mær til frelsu. Lat mótgang mín læra meg at elska teg og hava treysti í tær aleina. Lat líðingar mínar styrkja vón mína. Ger meg nýtiligan í tænastuni. Gev mær ta náði at vera øllum menniskjum til signingar.

Heilagi Kristus! Lat meg liva og doyggja í tær, so at eg einaferð loystur úr allari synd og øllum líðingum kann prísa heilaga navni tínum saman við øllum tínum frelsta fólki. Amen!

*t.* týddi.

# Tungumálini

*Tað eru so og so mong sløg av tungumálum til í heiminum, og onki av teimum er høpisleyst.*

*1. Kor. 14,10.*

Tú dugir kanska bara at tala eitt mál – tað, sum móðir tín lærdi teg. Tað, sum hon troystaði teg við og áminti teg við. Tað, tú lærdi at biðja við. Tað sum tú bert fram djúpastu kenslur tínar við, og við tí skalt tú biðja tínum kæru farvæl, tá ið tú einaferð skalt fara inn í ævinleikan.

Og tó dugir tú fleiri mál. Mál náttúrunnar talar til tín hvønn einasta dag. Tá ið ódnin leikar, sólin skínur, snarljósið skyggir, toran gongur, bløðini teska, regnið brestur á rútin – um tú tá lýðir á, hoyrir tú Guds reyst í øllum hesum. Í Jerusalem hoyrdu tey ein dagin toruna ganga; men summi søgdu, at ein eingil hevði talað við Jesus; men Jesus hoyrdi í toruni talu faðirs síns:

Tá kom ein rødd av himni: ”Bæði havi eg gjørt tað dýrmett og skal aftur gera tað dýrmett (Jóh.12,28)”

Málið í gerandisdegnum talar til tín í gleði og sorg, sigri og ósigri, vanlukku og mótgangi. Eisini í hesum førum hoyrir tú Jesus tala til tín. Hvønn einasta dag fáa vit ein boðskap frá Harranum. Hann átalar, uggar, eggjar og ávarar. Ver tí vakin og skjøtta eftir tí, sum fer fram uttan um teg, og lær av tí. Hugsa hvørt kvøld um tað, sum dagurin bar tær. Ber tað fram fyri Guds ásjón í aftanbøn tíni – met um tað. Í dag skuldi hann læra teg tað, sum tú ongantíð fært høvi at læra á sama hátt.

”Í dag, tá ið tit hoyra reyst mína, forherðið ikki hjørtu tykkara!”

*t.* týddi.

# Heilt heim –

Sóknarpresturin í Eliaskirkjuni í Keypmannahavn, A. Fibiger, gjørdist á eini møtiferð í Jútlandi brádliga sjúkur. Hann varð lammaður og doyði eftir fáum døgum. Hann hevði gjørt vart við, at hann fegin vildi flytast heim; men tá ið eitt av børnum hansara ein av seinastu døgunum, hann livdi, spurdi:

”Vilt tú so fegin sleppa heim, pápi?” fekk hann stamað fram úr sær sum svar:

”Ja **- heilt** heim – heim **til himmals!**“

Hetta vóru hansara seinastu orð.

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74